# UMSÓKN UM STUÐUL TIL MENTANARLIG TILTØK OG FRÍTÍÐARVIRKSEMI

*Tilskilað Eysturkommunu*

| |
|---|
| Journal nr. |

## A) Persónsupplýsingar
*(spjaldrastavir)*

| | | | |
|---|---|---|---|
| Føðingardagur: | | V-tal/P-tal: | |
| Fornavn/Felag: | | Eftirnavn: | |

## Bústaður

| | | | |
|---|---|---|---|
| Co.: | | | |
| Gøta: | | Telefonnr.: | |
| Postrúm: | | Telefax: | |
| Bygd/býur: | | Teldupost: | |

## B) Stuðul verður goldin um Føroya Gjaldstovu

| | | | | |
|---|---|---|---|---|
| Peningastovnur: | | | | |
| Kontunr. umsøkjarans: | Skrás.nr.: | | Kontunr.: | |

## C) Lýsing av endamálinum, ið søkt verður um stuðul til

| Lýsing av endamálinum, ið søkt verður um stuðul til: |
|---|
| |

Oyran 2 | 512 Norðragøta | Tlf.: 73 00 00 | eystur@eystur.fo

## D) Fíggjarætlan

Mettar útreiðslur og mettar inntøkur:

| | | | |
|---|---|---|---|
| Útreiðslur: | | Inntøkur: | |
| Ferðaútreiðslur: | | Eginpeningur: | |
| Tilfarsútreiðslur: | | Stuðul frá øðrum: | |
| Skeiðsútreiðslur: | | | |
| Aðrar útreiðslur: | | | |
| | | | |
| | | | |
| | | Søla: | |
| | | Aðrar inntøkur: | |
| | | | |
| | | | |
| Tilsamans: | | Tilsamans: | |

| | |
|---|---|
| Samlaður fíggjartørvur: | |
| Søkt verður um kr.: | |

## E) Aðrar upplýsingar av týdningi fyri viðgerðina

| Grundgev fyri, hví stuðul eigur at verða játtaður til endamálið: |
|---|
| |

## F) Hjáløgd skjøl

| Hjáløgd skjøl (vinarliga nevn hesi): |
|---|
| |

## G) Váttan

Undirskrift hjá umsøkjara

______________________________ Dagfesting

______________________________ Undirskrift umsøkjarans

# VEGLEIÐING TIL UMSÓKN UM STUÐUL TIL MENTANARLIG TILTØK

## A) Persónsupplýsingar og Bústaður
Fyri at kunna gjalda játtaðan stuðul til

a) privatpersón skal føðingardagur og p-tal upplýsast

b) felag, fyritøku ella stovn skal møguligt v-tal upplýsast

**GG! Samsvar skal vera millum navn á umsøkjara og navn á kontuhavara í teigi B**

Hevur felag, fyritøka ella stovnur sjálvstøðugan bústað, verður hesin upplýstur. Um felag, fyritøka ella stovnur hevur bústað hjá privatpersóni, t.d. formanni ella kassameistara, verður hesin upplýstur (brúka tá co: teigin til navnið á viðkomandi privatpersóni).

## B) Stuðul verður goldin út um Føroya Gjaldstovu
Samsvar skal vera millum teig A og B uttan mun til, um tað er ein privatpersónur ella felag, fyritøka ella stovnur, ið søkir um stuðul.

## C) Lýsing av endamálinum, ið søkt verður um stuðul til
Biðið verður um ymiskar upplýsingar um tiltakið, herundir t.d.:

- hví farið verður undir tiltakið
- hvussu nógvir og hvørjir luttakararnir eru
- hvørjir møguligu samstarvspartarnir eru (bæði føroyskir og útlendskir)
- til hvønn tiltakið er stílað (málbólkur)
- hvørji úrslit ein væntar at røkka
- nær tiltakið verður
- hvønn týdning mett verður, at tiltakið hevur
- stigtakari/takarar

## D) Fíggjarætlan
Heitt verður á umsøkjaran at hava so neyvar upplýsingar sum gjørligt og at halda seg til dagsins kostnað t.d. á ferðaseðlum, gisting o.ø. Um serlig avtala er gjørt við ávísan tænastuveitara, eigur hetta at viðmerkjast.

Inntøkurnar eru at skilja sum stuðul, ið annar stuðulsveitari hevur latið, ella tað, ið ein roknar við at fáa so fíggjarætlanin javnvigar. Hartil er neyðugt at upplýsa, um inntøkur eru frá sølu t.d. av atgongumerkjum, útgávum o.ø.

Fíggjartørvurin er at skilja sum munurin á útreiðslu- og inntøkuteigunum.
**GG! Teigurin "søkt verður um kr." eigur altíð at upplýsast.**

## E) Aðrar upplýsingar av týdningi fyri viðgerðina
Grundgev fyri, hví stuðul eigur at verða játtaður til endamálið:
Eru serlig atlit, ið ein metir hevur týdning fyri umsóknina, so er møguligt at nevna hesi í teigi E. Hetta kundi t.d. verið, um tiltakið vendir sær til ávísan bólk, ið hevur serligan tørv, ella at tiltakið er serliga kostnaðarmikið og nevna orsøkirnar fyri hesum.

## F) Hjáløgd skjøl
Um ein velur at senda skjøl saman við oyðublaðnum, t.d. eina útgreinaða fíggjarætlan, eitt CV ella ummæli o.s.fr., eiga hesi at verða nevnd í teigi F.

## G) Váttan
Vinarliga vátta og dagfest umsóknina, áðrenn hon verður send til Eysturkommunu. Um umsóknin verður send til Eysturkommunu við telduposti, verður navnið á umsøkjaranum roknað sum váttan ístaðin.

**GG! Umsóknir, ið eru latnar inn, eftir at freistin er úti, verða ikki viðgjørdar.**